Nr. 30 | Februar 2017

# MIÐ & MAGN

## Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið



Tema:

# Uppsjóvar-fiskiskapur

Verandi og nýggir aktørar brynja seg

Feløg halda eyga við nýggjum skipum

Trygga veitingin telur mest

87 skip skrásett í FAS

36 fingu prógv

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Annfinnur Garðalíð
Jóan Petur Patursson
Elias Zachariassen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Føroya Skipara-**
& **Navigatørfelag**
Smærugøta 9 A
Postboks 248
110 Tórshavn
Tel 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**Blaðhald**
Tey sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**Forsíðumynd**
Øssur Winthereig

**Umsiting og redkasjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig, ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen, ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris D. Magnussen,
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting:**
Estra

**Prent og liðugtgerð:**
Estra 478500

Upplag:1700



# Nú er at standa saman

Fríggjadagin 6. januar lýstu tey trý manningarfeløgini mynstringarbann ímóti uppsjóvarskipinum Hoyvík, ið skuldi koma til landið dagin eftir. Ætlanin var at fara til fiskiskap nærum beinanvegin, uttan at skipið var fevnt av sáttmála ella hevði nakra aðra avtalu við manningarfeløgini.

Sigast má, at mynstingarbannið hevði sín ætlaða virknað, tí longu saman dag bað reiðaríið um samráðingarfund. Eftir nøkrum tímum var avtalan komin til høldar, og mynstringarbannið kundi avlýsast.

Hendingin við Hoyvík var eitt klokkuklárt tekin frá manningarfeløgunum um, at tey standa saman og als ikki fara at góðtaka, at mynstringaravtalur bara verða gjørdar uttan um feløgini.

Hetta støðufesti er sera aktuelt nú, tí nógv øktu uppsjóvarkvoturnar, harav ein stórur partur væntast at verða seldur á uppboði, mugu væntast at lokka fleiri fólk at bjóða seg fram við keyptum ella leigaðum skipum.

Tað er bara gott, at fleiri skip og harvið fleiri arbeiðspláss koma í flotan, men hetta má ikki henda undir óskipaðum manningarviðurskiftum og heimasnikkaðum hýruavtalum.

Missa vit fyrst takið í so máta, verður støðið eisini máað undan høvuðssáttmálanum, tí hví skulu tey etableraðu reiðaríini, sum eru fevnd av hesum sáttmála, fara at góðtaka, at aðrir reiðarir hava frítt spæl at gera akkurát, sum teimum lystir?

Tí mugu vit standa saman, og vit mugu standa fast. Og mynstringarbannið ímóti Hoyvík vísti, at tað gera vit.



**Annfinnur Garðalíð**
*formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag*

# INNIHALD



Síða 4



Síða 8



Síða 14



Síða 33


**4 Trygga veitingin telur mest**
Veitingarfyritøkan KBI í Klaksvík hevur í 15 ár veitt tænastur til skip og virki.

**8 Verandi og nýggir aktørar brynja seg**
Øktar kvotur og útlit til, at meira enn higartil skal seljast á uppboðssølu hevur skundað undir áhugan at keypa skip.

**11 Feløg halda eyga við nýggjum skipum**
Tað er gott, um nýtt fólk eisini bjóðar seg fram at fiska nógv øktu uppsjóvarkvoturnar í ár.

**14 Fiskiárið 2016 var frægari enn 2015**
Aðalfundur hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag um ársskiftið.

**17 Nógvar sáttmálasamráðingar**
Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevði sáttmálasamráðingar við fleiri partar á arbeiðsmarknaðinum í 2016.

**19 87 skip skrásett í FAS**
Tað er framvegis áhugi fyri at koma í Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS.

**20 Semja um Strandferðsluna**
Fyri tveimum árum síðani lýstu manningarfeløgini arbeiðssteðg við skipunum hjá Strandferðsluni.

**21 FSN-nevndin afturvald**

**22 Semja við Skansa Offshore**

**24 Aspirantskipan bæði fyri navigatørar og maskinmenn**
Vinnuháskúlin hevur nú í eitt ár eisini havt eina aspirantskipan fyri navigatørar.

**26 36 fingu prógv**

**29 Tað er neyðugt at sigla**

**31 Onki arbeiðsloysi millum maskinmeistarar**

**33 Vápnaðar vaktir forða sjóránum**
Hóast tað í 2016 vóru fæst sjóræнaraálop í 20 ár, so merkir tað ikki, at vit ikki kunnu vænta fleiri sjórænaraálop, ávarar Richard Scurell

**36 Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum**

**37 Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum**

**38 Brennidepilin**
Óli Hans Olsen

**39 Føðingardagar**

# Trygga veitingin telur mest

**Veitingarfyritøkan KBI í Klaksvík hevur í 15 ár veitt tænastur til skip og virki. Seinastu tíðina hevur fyritøkan eisini lagt seg meiri eftir at veita tænastur til byggivinnuna.**

TEKSTUR OG MYNDIR: ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

– Vit leggja okkum eftir veitingartrygd, og at tænastan er góð. Tað er ikki bara prísurin sum er avgerandi fyri ein kunda, sigur Karl Birgir Isaksen, sum er stjóri og eigari av fyritøkuni KBI, sum hevur heimstað í Klaksvík.

KBI var stovnað í februar 2002 sum fyritøka, ið skuldi veita tænastur til skip og virki. Longu

Karl Birgir Isaksen er stjóri og eigari av veitingarfyritøkuni KBI í Klaksvík.



Framhald á næstu síðu >



Jógvan Isaksen hevur dagliga sambandið við skip og virki.

í 2003 var fekk KBI avtalu við Castrol/BP, um at selja smyrjiolju, og er tað í dag ein týðandi partur av virkseminum.

Uppi í teimum fyrstu uppgávunum hjá KBI vóru neyðstreymsanlegg til Vágatunnilin og veitingar til táverandi United Seafood.

– Vanligt var, at maskinmeistarar runnu frá handli til handil fyri at skaffa ymsa útgerð – og tískil høvdu teir næstan ongantíð frí. Tað arbeiðið gera vit nú fyri reiðaríini, sigur Jógvan Isaksen, sum starvast hjá KBI og hevur dagliga sambandið við skip og virki.

– Nú senda reiðaríini bara ordrar – ein fyri dekkið, ein fyri fabrikkina ella ein fyri maskinrúmið. So taka vit okkum av tí – antin útvega vit tað í Føroyum, ella fáa við vørur við flogposti heim, sigur Karl Birgir Isaksen.

## Stór amboð

Tey fyrstu árini høvdu teir sølu frá goymsluni á keiini við Dávavirkið í Klaksvík, men í 2005 bygdu teir goymslu og handil í Klingrugarðinum í Klaksvík.

– Vanlig fólk koma og keypa eina gassfløsku ella okkurt smávegis, men flestu kundarnir eru handverkarar og maskinmeistarar ella fólk, sum skulu brúka amboð ella onkra útgerð í sínum arbeiði, heldur Karl Birgir Isaksen.

Tá teir á KBI tosa um amboð, er oftast talan um stór amboð: sveisingartól, dreyibenkur og trygdarútgerð.

Umframt virksemi í Føroyum til skip – og eisini alivinnuna – so veitir KBI tænastur til føroysk skip,

KARL BIRGIR ISAKSEN:

**Kanska veita vit heldur meiri til byggivinnuna nú enn vit hava gjørt. Eg vóni bara, at vit royna at halda vitanina – eisini í byggivinnuni – í Føroyum. Eisini fyri at halda pengarnar í landinum**

sum sigla uttanlands. Standa tey og mangla ein eykalut onkrastaðni, so er tað ein uppgáva, sum ein veitingarfyritøka sum KBI, loysir.

Í samstarvi við Faroe Agency veitir KBI meginpartin av tænastum og veitingum, sum russisku skipini í Føroyum hava brúk fyri. Klaksvíksfyritøkan umboðar eisini stóru norsku fyritøkuna Wilhelmsen í Føroyum.



Í 2005 bygdu teir goymslu og handil í Klingrugarðinum í Klaksvík.



## Byggivinnan áhugaverd

10 fólk starvast í dag hjá KBI – mest handverkarar og maskinmeistarar. Tey merkja, at virksemið innan supply-vinnuna er minkað nakað, men kortini ikki so, at tað hevur gjørt stóran mun.

– Kanska veita vit heldur meiri til byggivinnuna nú, enn vit hava gjørt. Eg vóni bara, at vit royna at halda vitanina – eisini í byggivinnuni – í Føroyum. Eisini fyri at halda pengarnar í landinum, sigur Karl Birgir Isaksen.

At Karl Birgir Isaksen eisini skoytir onkrar politiskar viðmerk-

Karl Birgir Isaksen og Jógvan Isaksen á goymsluni.

KBI umboðar SKF, sum er ein av stóru leiðiframleiðarunum.



ingar upp í samrøðuna, ger ikki tey, sum kenna hann, bilsin.

Karl Birgir Isaksen hevur verið býráðslimur í Klaksvík í nógv ár fyri Fólkaflokkin. Hann er formaður í Vinnulívsráðnum í Klaksvík og er eisini ein av headmonnunum aftan fyri Sjómannadagin í Klaksvík.

Eina aðrastaðni í Klaksvík rekur Karl Birgir Isaksen fitness-stovuna Íðka.



Vinnuháskúlin hevur í samstarvi við KBI í Klaksvík útvegað sær nýmótast útgerð, sum kann brúkast at gera royndir av eitt nú smyrjiolju og ymiskum kemiskum løðum. Hetta er útgerð, sum er umborð á stóru skipunum, men sum enn ikki er so vanlig umborð á smærri skipum.

# Verandi og nýggir aktørar brynja seg

**Øktar kvotur og útlit til, at meira enn higartil skal seljast á uppboðssølu hevur skundað undir áhugan at keypa skip. Manningarfeløgini fegnast, men halda samstundis eitt vakið eyga við, at sáttmálar verða hildnir, og at trygdin er í lagi.**

TEKSTUR: INGOLF S. OLSEN – PRESS. MYNDIR: TORLEIF JOHANNESEN

Røringur er í føroyska fiskiflotanum, nú hol er sett á seinasta árið við verandi fiskivinnuskipan, og útlit samstundis eru til ógvusliga øktar uppsjóvarkvotur, sum harafturat í nógv størri mun enn áður skulu seljast á uppboðssølu.

Beint eftir nýggjár komu tvey nýggj uppsjóvarskip í flotan. Framherji í Fuglafirði keypti norska Torbas, og Thor í Hósvík ognaði sær Østanger, sum eisini varð keyptur úr Noregi.

Torbas fekk navnið Høgaberg og kom inn fyri skipið av sama navnið, sum seint í fjør var selt til Íslands.

Sostatt økti nýggi Høgaberg ikki um skipatalið í flotanum, men skipið er bert tvey ára gamalt, nýmótans og vælútgjørt, bæði tá tað kemur til útgerð, arbeiðsumtøður og trivnað.




Hoyvík kom flaggskrýddur á Havnina leygarmorgunin 7. januar. Kvøldið fyri eydnaðist at sleppa undan einari meira rokaligari móttøku, tí tá fekst semja í lag ímillum reiðaríið og manningarfeløgini.

Framhald á næstu síðu >




Østanger fekk navnið Hoyvík, og onki skip er farið út ístaðin, so her er talan um eitt nýtt far í føroyska flotanum. Skipið er ikki nakar ársungi, tí tað er útvið 38 ára gamalt. Men sambært reiðaranum Hans Andriasi Kelduberg er tað í góðum standi.

Hoyvík hevur annars eisini itið Høgaberg einaferð. Tað hevur nevniliga tvær ferðir áður verið undir føroyskum flaggi, einaferð sum Gullfinnur og einaferð sum Høgaberg.

Hoyvík mundi fingið eina rættiliga keðiliga byrjan, tá skipið kom til landið eina viku inni í tí nýggja árinum.

Thor-reiðaríið p/f Thor Fisheries, sum eigur skipið, er nevniliga ikki limur í Føroya Reiðarafelag, sum manningarfeløgini hava sáttmála við, og tá reiðarin heldur onga avtalu hevði gjørt við tey um hýruna og manningarviðurskiftini annars á Hoyvík, lýstu manningarfeløgini mynstringarbann. Men kvøldið fyri, at skipið kom á Havnina, varð semja gjørd, og mynstringarbannið avlýst.

## Fleiri í væntu

Umframt tey bæði skipini, sum komu til landið sama dag, 7. januar, er tað greitt, at eitt nýtt skip kemur í flotan í staðin fyri verksmiðjutrolaran Næraberg úr Klasksvík seinni í vetur ella í vár. Tað er eisini longu greitt, at tað skipið skal eita Borgarin, og at talan verður um eitt vanligt kombinerað uppsjóvarskip og ikki verksmiðjutrolara.

Eisini frættist, at suðuroyarreiðaríið, ið átti Asbjørn og áður eisini Grunnabar, leitar eftir skipi at keypa til uppsjóvarfiskiskap, og nógvar leysasøgur eru um onnur feløg og einstaklingar, ið liggja framvið.

## Væl størri kvotur

At áhugin at ogna sær skip er stórur, er ikki so løgið, tí seinastu

Á Høgabergi var eisini móttøka 7. januar. Skipið er bara tvey ára gamalt og sostatt yngsta fiskiskipið í flotanum.

mánaðirnar hevur ligið í kortunum, at føroysku uppsjóvarkvoturnar fóru at økjast munandi.

Strandalandasemja er um makrelin, og býtið í ár var longu klárt og undirskrivað 19. oktober í fjør. Her er økingin ikki so ógvuslig – føroyska kvotan í ár er 128.655 tons, tað eru sløk 16.000 tons meira enn í fjør.

Men bæði við norðhavssildini og svartkjaftinum er øðrvísi, tí her gera kvoturnar ógvuslig lop uppeftir.

Tað er ikki eydnast strandarlondunum at semjast um býtið av hesum báðum fiskasløgunum, og um hálvan januar ásetti Høgni Hoydal, fiskimálaráðharri, einsæris tær føroysku kvoturnar.

Úrlsitið er, at føroysk skip í ár sleppa at fiska 476.901 tons av

svartkjafti, tað eru góð 200.000 tons meira enn í fjør, og 125.597 tons av norðhavssild, tað eru sløk 70.000 tons meira enn í fjør.

Til samans eru føroysku kvoturnar av makreli, sild og svartkjafti sostatt góð 285.000 tons størri í ár enn í fjør.

## Nógv á uppboðssølu

Júst hvussu kvoturnar verða lutaðar út, er ikki greitt enn, men í „Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017", sum varð samtykt stutt fyri jól er heimilað fiskimálaráðharranum at selja veiðirættin til alla økingina – tann partin av hvørjari kvotu, sum er størri enn kvotan í 2016 – á uppboðssølu, tá tann parturin fyrst er farin av, sum verður latin í umbýti við onnur lond.

Her er tó vert at leggja dent á, at landstýrismaðurin kann gera av at brúka ein fittan part av øktu uppsjóvarkvotunum at býta um við onnur fiskasløg í frammandum sjógvi. Um so verður, er spurningurin so, hvussu kvoturnar, vit fáa í býti, tá verða lutaðar út.

Neyvan fer nakað av botnfiskakvotunum í Barentshavinum, sum eru fingnar til vega gjøgnum vanligu millumlandasamráðingarnar við Noreg og Russland, á uppboðssølu í ár.

Lógin heimilar fiskimálaráðharranum at selja tað, sum fer upp um 27.000 tons av hesum kvotum á uppboðssølu, tó í mesta lagi 10 prosent. Men samlaða kvotan í Barentshavinum í ár er bara 28.000 tons, tá smáar kvotur av upsa, flatfiski og øðrum fiskasløgum eisini eru taldar við.




www.fma.fo • fma@fma.fo • tel 35 56 00
SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Framhald á næstu síðu >

# Uppsjóvarfiskiskapur: **Feløg halda eyga við nýggjum skipum**

**Tað er gott, um nýtt fólk eisini bjóðar seg fram at fiska nógv øktu uppsjóvarkvoturnar í ár, halda bæði Annfinnur Garðalíð og Páll Hansen. Men feløgini halda eitt vakið eyga við standinum á skipunum, sum verða keypt ella leigað inn til fiskiskapin.**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN – PRESS

Longu fyrstu vikuna í árinum komu tvey nýggj uppsjóvarskip í flotan – Hoyvík hjá Thor í Hósvík og Høgaberg hjá Framherja í Fuglafirði – og fleiri væntast at verða keypt ella leigað inn, sum líður á árið.

Stóru uppsjóvarkvoturnar og niðurteljingin til eina nýggja fiskivinnuskipan fær bæði verandi reiðarar og onnur, sum eru spent at sleppa upp í part, at brynja seg. Og tað er gott, halda bæði Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

– Øktar kvotur og fleiri skip merkir eisini størri útboð av arbeiðsplássum til okkara limir, og tey skulu vera hjartaliga vælkomin, sigur Annfinnur Garðalíð.

– Vit hava hoyrt nógvar dómadagsprofetiir um alt tað ringa, sum skal fara at henda, nú politikararnir manirera við einari nýggjari fiskivinnuskipan, men tað sum hendir í flotanum nú er í øllum førum bara at fegnast um, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

## Eitt vakið eyga

Tá nógv skip koma í senn, er altíð ein ávísur vandi fyri ruðuleika viðvíkjandi manningarviðurskiftum og eisini sjálvum standinum á skipunum. Serliga um talan er um nógv eldri skip og skip hjá nýggjum aktørum, sum ikki eru limir í Føroya Reiðarafelag, og tískil ikki eru fevnd av galdandi sáttmála.

Men øllum hesum halda manningarfeløgini eitt vakið eyga við.

– Tá tað kemur til standin á skipunum, mugu vit ganga út frá, at avvarandi myndugleiki, Sjóvinnustýrið, ger sítt arbeiði og tryggjar, at skipini lúka øll føroysk krøv. Hjá teimum gomlu reiðaríunum er onki roks við sáttmálum fyri okkara viðkomandi, tí vit gera ongar sersáttmálar fyri tey, men halda okkum til galdandi sáttmála.

– Tá talan er um reiðarí, sum ikki eru fevnd av sáttmálanum, mugu vit sjálvandi gera sersáttmála, men so verður talan um treytir, sum eru meinlíkar teimum í sáttmálanum – soleiðis hava vit til dømis gjørt seravtalu við reiðaríið, sum eigur Hoyvík, tí tað er ikki limur í Reiðarafelagnum, greiðir Páll Hansen frá.

Annfinnur Garðalíð sigur, at tey

INGOLF S. OLSEN – PRESS



Tað kom til skarpskeringar fríggjadagin 6. januar, tá øll trý manningarfeløgini lýstu mynstringarbann ímóti Hoyvík, sum skuldi koma í flotan dagin eftir og hava stórfingna móttøku. Men í evstu løtu fekst semja millum partarnar kvøldið fyri, og allir partar vóru fegnir, tá klárt var at skriva undir. Úr vinstru eru tað Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, Hans Andrias Kelduberg, reiðari, og Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

ætla at hyggja væl eftir, at ongin fer at gera sær dælt av serligu støðuni og royna at smoyggja sær undan at virka eftir føroyskum lógum og reglum og ikki minst føroyskum sáttmálum.

– Vit hava sæð ov nógv til tann trupulleikan, tá støðan annars skal eitast at vera vanlig, so vandin fyri cowboymentaliteti og óreiðiligheit er sjálvandi størri, tá vit hava nakað, sum líkist einum uppsjóvarævintýri. Men vit fara undir ongum umstøðum at góðtaka sosiala dumping, ella at galdandi sáttmálar verða undirbjóðaðir, sigur hann.

## Seravtala við Hoyvík

Tað gav at býta, tá Hoyvík kom til landið stutt eftir nýggjár. Tí reiðaríið, sum ikki er limur í Føroya Reiðarafelag, hevði onga avtalu við manningarfeløgini, og tað lá í kortunum, at tað ætlaði at lata manningina mynstra eftir egnari avtalu.

Tí lýstu øll trý manningarfeløgini saman mynstringarbann kvøldið fyri, at skipið kom til landið um morgunin 7. januar. Men kvøldið fyri settust reiðaríið og manningarfeløgini við samráðingarborðið og fingu eina avtalu í lag. Mynstringarbannið kundi tí avlýsast, áðrenn tað nakrantíð bleiv aktuelt.

Avtalan, sum Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag hava við Hoyvík, sigur, at skipið fiskar eftir ídnaðarsáttmálanum við býtisprosenti 27, tá tað fiskar í Norðsjónum, og eftir nótasáttmálanum við býtisprosenti 17,5, tá tað fiskar eftir føroyskum makrel-, silda-,- og svartkjaftakvotum. Reiðaríið skal eisini rinda teimum báðum feløgunum eitt avgreiðslugjald svarandi til limagjaldið hjá sáttmálafevndu reiðaríinum. Tá skipið tekur lut í felagsfisking – partroling við móðurskipi – kann Hoyvík í mesta lagi fáa 70 prosent av avreiðingarvirðinum, og trolaraparið sostatt í minsta lagi 30 prosent.

Annars eru felagsreglurnar í sáttmálanum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag galdandi.

Seravtalan við Hoyvík má væntast at verða grundarlag undir øðrum líknandi semjum, um brúk verður fyri tí.

Føroya Fiskimannafelag hevur kravt eykapartar til teirra limir, um felagið skal ganga við til seravtalur fyri skip, sum felagið metir hoyra til bólkin ídnaðarskip. Tí hevur tað felagið gjørt sínar egnu seravtalur, eisini við reiðarí, sum annars eru fevnd av høvuðssáttmálanum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag.







# SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

## VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

## TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

SENDISTOVAN

# Fiskiárið 2016 var frægari enn 2015

**Á aðalfundi hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag um ársskiftið røddi formaðurin millum annað um fiskiskapin í farnað árinum, um fiskivinnunýskipanaruppskotið og sáttmálasamráðingar. Á næstu síðunum hava vit brot úr formansfrágreiðingini – nakað redigerað.**

TEKSTUR OG MYNDIR: GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Nevndin hevur havt fleiri nevndarfundir í 2016. Men av tí, at nevndin er mannað við limum, sum í gerandisdegnum arbeiða á sjónum, er ikki altíð so lætt at manna ein viðtøkuføran nevndarfund. So nevndin gjørdi av at hava nevndarfund annan hvønn mánaða, annars varð kallað inn eftir tørvi. Hetta vísti seg at rigga rímiliga væl.

Nógvar sáttmálasamráðingar hava verið hetta árið, nakrar eru framvegis ikki lidnar. Millum samráðingarnar kunnu nevnast samráðingar við Lønardeildina



Hetta er næsta formansfrágreiðingin hjá Annfinni Garðalíð, formanni í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Framhald á næstu síðu >

Niels J. Nielsen, nevndarlimur, svaraði spurningum í sambandi við formansfrágreiðingina – saman við Annfinni Garðalíð.




um Magnus Heinason, Vaktar & Bjargingartænastuna (Vørn), Strandferðsluna, Havnameistarar & havnaumsjónarfólk, smáu bulk-reiðaravirkini, og við navigatørar, sum starvast á landi.

Millum samráðingarnar í komandi ári kunnu nevnast samráðingarnar við Strandferðsluna, Vaktar & Bjargingartænastuna, smáu bulk-reiðaravirkini, og samráðingarnar við Reiðarafeagið fyri fiskiskip. Kann henda, at hesin sáttmálin verður longdur eitt ár, soleiðis sum fiskivinnan sær út í dag.

## Fiskivinnan

Árið 2016 hevur verið nakað betri enn 2015. Tað vísa tøl hjá Fiskamarknaði Føroya av fiskasølu um telefonuppboðssøluna. Landaða veiðan hevur verið á leið tann sama, men veiðuvirðið hevur verið munandi hægri – umleið 16 milliónir krónur.

Í 2014 var samleiða veiðan 14.000 tons og í 2015 var veiðan 14.400 tons. Størsta broytingin var í veiðuni eftir svartkalva.

ANFINNUR GARÐALÍÐ:

**Fatanin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag er, at talan var um reint spæl fyri gallarínum.**

## Fiskivinnunýskipanin

Eftir løgtingsvalið í heyst varð Høgni Hoydal settur sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Skjótt varð avgjørt, at fiskivinnan skuldi kollveltast, hóast nógv hevur verið gjørt fyri at fáa eina burðardygga vinnu. Øll eru greið yvir, at fiskiloyvini verða drigin inn 31. desember 2017. Alt er ótrygt. Ongin veit, hvat morgindagurin hevur at bjóða.

Tann 31. januar í 2016 setti Høgni Hoydal ein arbeiðsbólk, sum skuldi koma við uppskoti um eina fiskivinnnýskipan. Níggju fólk vórðu sett í bólkin, og Johnny í Grótinum gjørdist formaður. Tveir hoyringsbólkar vórðu eisini settir. Í hoyringsbólki nummar 1 vóru umboð fyri alla vinnuna, og í hoyringsbólki nr. 2 vóru umboð fyri politisku flokkarnar.

Nógvir fundir vórðu hildnir í nýskipanarbólkinum, einir 28 í tali, men bara tríggir í hoyringsbólki 1 og 2.

## Spæl fyri gallarínum

Fatanin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag er, at talan var um reint spæl fyri gallarínum. Felagið kom við nógvum góðum uppskotum, og vístu á vandan við kvotuskipan á botnfiski í staðin fyri eina dagaskipan, og víst varð eisini á vandan við einari uppboðssølu. Á seinasta fundinum spurdi Føroya Skipara- og Navigatørfelag formannin í arbeiðsbólkinum, Johnny í Grótinum, hvat roknast kundi við, varð tikið við í nýskipanaruppskotið. Svarið var, at tað visti formaðurin ikki – kanska varð einki tikið



við. So her helt felagið seg vera hildið fyri tað turra spott. Nú fæst at síggja, hvussu leikur fer.

Álitið hjá nýskipanarbólkinum varð lagt fram 3. oktober í 2016.

Alt tos um uppboðssølu og kvotuskipan og bare boat-skipan hevur skapað nógva og stóra óvissu kring fiskivinnuna, heldur Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Tað er breið semja í felagnum um at varðveita skipanina, sum hon er í dag, men tó við øktari kvotu. Tá átti at borið til at latið fleiri sloppið framat.

## Frálandavinnan

Minkandi virksemið í norska oljuídnaðinum sæst aftur í norsku oljuhavnunum. Har, sum skip vanliga komu og fóru hvønn einasta dag, verða skip nú liggjandi í vikur uttan uppgávur.

Í Bergen liggja hvønn einasta dag fleiri skip og bíða. Og tey eru heppin, tí tey ikki enn eru tikin úr flotanum. Tað sama er galdandi í øðrum oljubýum sum Stavanger, Kristiansund og Ålesund.

Verri er vorðið við teimum 151 skipunum, sum í dag eru løgd. Hetta er umleið ein fjórðingur av øllum norska frálandaflotanum upp á 630 skip. At so nógv skip liggja merkir samstundis, at húsagangurin nærkast hjá fleiri reiðaravirkjum. Nýggj skip í hópatali eru smíðað seinnu árini, og trupult er at svara hvørjum sítt fíggjarliga. Sambært Stavanger Aftenblad hava fleiri reiðaravirki eina skuld upp á einar 20 milliardir norskar krónur. Samstundis er dagsprísurin at leiga eitt frálandaskip lækkaður úr umleið 1,5 milliónum norskum krónum niður í einar 50.000 norskar krónur. Tá er ikki nógv eftir í manningarpart.

Einir fjøruti limir vóru á aðalfundinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Hóast oljuprísurin kvinkar uppeftir, so fylgir prísurin ikki við hjá frálandaflotanum. Tískil verður roknað við, at uppaftur fleiri reiðaravirki fáa trupulleikar komandi tíðina.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur fingið fyrispurning frá føroyskum reiðarum um at lækka sáttmálalønina, nú niðurgangstíðir eru í oljuvinnuni. Men har hevur felagið gjørt greitt, at gjørd varð semja um ein tvey ára sáttmála, og tað vil felagið eisini halda seg til.

Framhald á næstu síðu >

# Nógvar sáttmála-samráðingar

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevði sáttmálasamráðingar við fleiri partar á arbeiðsmarknaðinum í 2016, teirra millum smærru farmaskipini, havnafútar og vaktarskipini.**

TEKSTUR OG MYNDIR: GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Hin 13. februar í 2016 hittust Føroya Skipara- og Navigatørfelag og umboð fyri smærru reiðaravirkini. Á skránni vóru sáttmálaviðurskiftini. Sáttmálin var ótíðarhóskandi, tí onnur og størri skip vóru komin inn í flotan. Ongar dagføringar vóru gjørdar í fýra ár. Tann 18. februar handaðu partarnir hvørjum øðrum krøvini.

Nakrar vikur seinni, hin 23. mars, varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður. Føroya Skipara- og Navigatørfelag heldur, at felagið hevur fingið ein góðan sáttmála. Tað var ongin løtt uppgáva at tosa um lønarhækkingar – serliga havandi í huga truplu støðuna í handilsflotanum um allan heim.

## Havnafútar

Sáttmálin millum Skipara- og Navigatørfelagið og Kommunala




Partar av nevndini hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag avmynda á aðalfundini 28. desember í 2016.

Arbeiðsgevarafelag Føroya varð uppsagdur í november. Hetta er sáttmálin við havnafútar. Ein trupulleiki var, at long tíð var gingin, síðan sáttmálin var dagførdur seinast. Men 16. februar varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður.

Talan er um nógvar ferðir betri lønartalvur. Nú er lønartalvan býtt soleiðis upp, at havnaumsjónarfólk ganga stigini frá og við 1. stigi og til og við 7. stig, og havnafútarnir ganga stigini frá 8. stigi til og við 14. stig. Talan er um ein betri sáttmála, enn Starvsmannafelagið hevur á sama øki. Avtalað var eisini at seta ein bólk at orða eitt loðsuppskot. Endamálið er at lýsa, hvussu loðsar skulu samsýnast og hvørji krøv eru til trygdarbúna og loðsbátar. Ætlanin er at broyta verandi loðskunngerð.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur sent inn viðmerkingar, har felagið vil hava broytingar framdar, soleiðis at eisini skiparaprógv gevur rætt at taka loðsprógv. Felagið vil eisini hava broytt, at føroyskir skiparar á útlendskum skipi ikki kunnu koma í føroyska havn, uttan at taka loðs. Felagið vil haraftrat hava broytingar í samsýningini, krøv til trygdarbúna og reglur til loðsbátar.

Í mai mánaða undirskrivaðu Skipara- og Navigatørfelagið undir tvey ára sáttmála í sambandi við Magnus Heinason. Bert smærri broytingar vórðu gjørdar. Semja var um, at kemur nýtt skip í flotan fyri Magnus Heinason, so skulu partarnir taka upp nýggjar samráðingar beinanvegin.

## Navigatørar á landi

Føroya Skipara- og Navigatørfelag arbeiðir við at fáa sáttmálar fyri navigatørar, sum arbeiða á landi, har kravið til starvið er nautisk útbúgving. Talan kann vera um sýnsmenn, fólk á almennum stovni sum Strandferðsluni, fólk í starvi hjá reiðaravirkjum og líknandi. Felagið metir tað vera av størsta týdningi at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Hetta er eisini eitt ynski, sum navigatørar hava.

Fyrr nevndu arbeiðsøki umfata í løtuni sáttmála við Starvsmannafelagið, og tað heldur Føroya Skipara- og Navigatørfelag vera ein trupulleika. Felagið hevur skotið upp, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag yvirtekur samráðingarrættin á hesum økjum, men tað hóvar ikki Starvsmannafelagnum. Formaðurin í Starvsmannafelagnum skuldi tó taka málið upp við nevndina, men Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur onki frætt aftur um hetta.

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Aðalfundurin 2017

**Aðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum verður leygardagin tann 18. mars kl. 14 á Hotel Hafnia.**

Skráin er sambært lógini hendan:
1. Val av fundarstjóra.
2. Frágreiðing formansins.
3. Leggja fram roknskap til góðkenningar.
4. Uppskot um lógarbroytingar.
5. Val av nevndarlimum og tiltakslimum.
6. Ásetan av limagjøldum
7. Velja skrásettan grannskoðara.
8. Ymiskt.

Aftaná aðalfundin verður smyrjibreyð og okkurt drekkandi at fáa.

Møgulig uppskot at leggja fyri aðalfundin skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar undan aðalfundinum.

Regin Olsen og Jóhan Weihe standa fyri vali til nevndina.

# 87 skip skrásett í FAS

**Tað er framvegis áhugi fyri at koma í Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS. Men í 2016 vóru trý afturhald, og tað er ikki gott.**

TEKSTUR OG MYNDIR: GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Ov nógv brek ella feilir hava verið við skipum í FAS seinasta árið. Tískil eru Føroyar farnar niðureftir á listanum hjá Paris MoU. Sostatt skal lítið til, at vit aftur enda á Gráalista, og tað er óheppið, um vit skulu varðveita okkara góða umdømi úti í heimi, segði Annfinnur Garðalíð á aðalfundinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Seinast í januar í fjør var Faroese Maritime Union, FMU, boðsent at koma til Danmarkar á fund við International Transport Workers Federation, ITF. Á skránni var støðan hjá Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS, í sambandi við FOC (flag of convenience - hentleikaflagg).

FMU vísti á lógarbroytingar, sum eru gjørdar í FAS, og at vit hava sáttmálar við føroysku reiðaravirkini.

Málið skuldi takast uppaftur í London í mai mánaða. Tá merktist tað beinanvegin, at avgerð longu var tikin í málinum, nevniliga at FAS framhaldandi skuldi vera á FOC-listanum. Ein grundgeving var, at fleiri av skipunum í FAS vóru sonevnd bare-boat-skip ella leiguskip. Sagt varð, at komu vit av FOC-listanum, vildu fleiri svensk skip lata seg skráseta í FAS.

Hetta heldur Føroya Skipara- og Navigatørfelag vera eina vánaliga grundgeving fyri, av vit skulu vera FOC-skrásett.




Vit skulu ansa okkum, so Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS, ikki aftur endar á sonevnda gráalista.

# Samdust við Fíggjarmálaráðið um Strandferðsluna

**Fyri tveimum árum síðani lýstu manningarfeløgini arbeiðssteðg við skipunum hjá Strandferðsluni. Nú er málið loyst.**

TEKSTUR OG MYNDIR: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** – PRESS

Ósemja hevði tikið seg upp, hvørt Strandferðslan hevði heimild at krevja manningina at sigla føstu frídagarnar, og at tað samstundis var lagt upp fyri nevndu dagar í fastlønini.

Fasti Gerðarrætturin dømdi stríðsstigið hjá manningarfeløgunum ólógligt, og segði, at ósemjan hoyrdi heima í Fasta Gerðarrættinum.

17. september í 2015 kom úrskurðurin hjá Fasta Gerðarrætti. Manningarfeløgini fingu viðhaldi í spurninginum viðvíkjandi lønarsamsýning. Tí noyddust partarnir at finna eina semju um samsýning.



## 45 prosent fyri fullan dag

Kravið var í minsta lagi 45 prosent fyri fullan dag (13 tímar). Her stóðst aftur ein ósemja, hvørt tað var rætt at fáa 13 tímar og 45 prosent. Fíggjarmálaráðið kom við einari talvu, ið vísti, hvussu skipini høvdu siglt, áðrenn fastlønaravtalan kom í gildi. Men har var villa íkomin í sambandi við tímatalvuna hjá Teistanum.

Talvan vísti, at navigatørarnir skuldu fáa 16,5 tímar pluss 40 prosent, meðan Maskinmeistara-

Partvís semja fekst á stríðnum um føstu frídagarnar umborð á skipum hjá Strandferðsluni.

felagið stóð at fáa 8,25 tímar og 40 prosent. Fíggjarmálaráðið vildi hava Føroya Skipara- og Navigatørfelag at viðurkenna, at skrivivilla var íkomin. Føroya Skipara- og Navigatørfelag greiddi Fíggjarmálaráðnum frá sínum sjónarmiðum, og fingu viðhald. Tað merkir, at navigatørarnir fingu 16,5 tímar pluss 40 prosent.

Nevndin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag er væl nøgd við úrslitið.



Teir atkvøða á aðalfundinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag

# Nevndin afturvald

## Á aðalfundi hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag stóðu seks nevndarlimir fyri vali.

TEKSTUR OG MYND: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** – PRESS

Hesir vóru Annfinnur Garðalíð, Leivur Christiansen, Niels J. Nielsen, Annfinn Fagraklett, Jan Haldansen og Andrew Svenning Borg. Teir vóru allir afturvaldir. Í nevndini sita umframt formannin Annfinn Garðalíð (myndin), eisini Leivur Christiansen, Niels J. Nielsen, Annfinn Fagraklett, Jan Haldansen Andrew Svenning Borg, Ellintur M. Abrahamsen, Kristin Friis, Elias S. Zachariassen, Ólavur Biskopstø og Jákup Gøthe. Nevndin hevur aftur hesaferð skipað seg við Annfinni Garðalíð sum formanni og Elias S. Zachariassen sum næstformanni.



# Semja við Skansa Offshore

**Málið viðvíkjandi skeiðsútreiðslum, grein 11 í sáttmálanum millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Reiðarafelagið Fyri Farma-/frálandaskip, endaði við semju.**

TEKSTUR OG MYNDIR: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** – PRESS

Partarnir vórðu samdir um, at teksturin í sáttmálanum er so illa orðaður, at besta loysnin var at gera eina semju, sum báðir partar høvdu ávirkan á. Men har var eisini ávís ósemja, so hetta var av røttum eitt trætumál. Nøkur uppskot um semju vórðu gjørd, og partarnir samdust um at taka hesa orðing sum semju:




*„Fyri skeiðsútreiðslur yvir kr. 25.000,00, hildnar fyrstu 2 árini eftir fyrsta starvssetanardag sum navigatørur hjá reiðaranum, hevur reiðarin rætt at krevja hesar skeiðsútreiðslur aftur frá navigatørinum, um hann sigur seg úr starvi ella av lógligari grund verður burturvístur innan fyri 4 fyrstu setanarárini.*

*Afturgjaldskravið verður niðurskrivað soleiðis – í mun til starvssetanartíðina:*

*til og við 3. setanarárið sum navigatørur, kunnu verða kravd 100%*

*4. setanarárið sum navigatørur, kunnu verða kravd 75%*

*Eftir 4. setanarárið sum navigatørur, kann einki verða kravt aftur.*

*Afturgjaldingin skal tó í mesta lagi svara til eina mánaðarløn íalt.*

*Mánaðarlønin er lønin, sum navigatørurin verður løntur við, tá hann sigur seg úr starvi ella verður burturvístur.*

*Reiðarin hevur skyldu til skrivliga at kunna navigatørin um omanfyri nevndu afturgjaldsreglur. Skeiðsútreiðslurnar eru kostnaðurin fyri skeiðini, ferðing og uppihald.“*

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Skansi Offshore eru nú komin ásamt í sambandi við skeiðsútreiðslur til navigatørar.




# Lat okkum hjálpa tær at seta saman fíggjarliga trygdarnetið, so hongur tað ikki á tær

Kundin eigur LÍV. Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Kopargøta 1, Tórshavn | **www.liv.fo**

# Aspirantskipan bæði fyri navigatørar og maskinmenn

**Vinnuháskúlin hevur nú í eitt ár havt eina aspirantskipan fyri navigatørar. Eitt nýtt toymi byrjaði eftir summarsteðgin, soleiðis at tað nú ganga tveir aspirantflokkar á Vinnuháskúlanum.**

TEKSTUR OG MYNDIR: GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Í høvuðsheitum hevur aspirantútbúgvingin verið ætlað teimum, sum ikki hava siglingstíð, men hava miðnámsskúla ella líknandi. Av teimum fjúrtan, sum byrjaðu, eru ellivu framvegis á aspirantbreytini. Tríggir eru givnir.

Avtala er gjørt við føroysk reiðaravirkir. Næmingarnir eru so stundum í skúla og aðrar tíðir sigla teir. Tilsamans tekur hetta teimum fýra ár, og tá teir eftir loknan lestur fáa sítt prógv, eru teir skipsførarar og hava nøktandi siglingstíð. Sostatt fáa teir vinnu-




Aspirantskipanin hjá navigatørum á Vinnuháskúlanum hevur nú riggað í eitt ár. Eftir summarfrítíðina verður ein nakað líknandi skipan sett í verk fyri maskinmeistaraaspirantar.

bræv við loyvi at vera stýrimenn umborð á farmaskipum.

Í løtuni er ongin skipan, sum gevur hesum aspirantunum møguleika at taka eina bachelor.

## Maskinmeistarar

Eftir summarsteðgin í ár verður ein aspirantskipan fyri maskinmeistarar sett í verk. Hendan skipanin kemur partvís at virka sum skipanin hjá navigatørum. Teir koma skiftivís at ganga í skúla og at sigla. Eftir fýra ár eru teir maskinmeistarar við vinnubrævi. Hjá maskinmeistarunum er kortini tann munurin í skipanini, at maskinmeistarar kunnu fara víðari at taka eina bachelor.

Skipanin við bachelor verður gjørd í samstarvi við Fróðskaparsetrið. Teir maskinmeistarar, sum hava áhuga fyri tí, kunnu fara víðari á eitt tvey-ára skeið í maskinverkfrøði, og soleiðis taka eina bachelor-úgbúgving. Fróðskaparsetrið skal samstarva við Danmarks Tekniske Universitet, DTU, um hesa útbúgvingina.

## Studningsskipanin

Studningsskipanin fyri aspirantar krevur ávísar ábøtur. Til dømis verður studningur latin fyri 11 mánaðar og onki fyri 12. mánaðin. Orsøkin skal vera, at 12. mánaðurin verður mettur sum frítíð hjá tí lesandi. Men her hevur Føroya Skipara- og Navigatørfelag gjørt vart við nakrar skeivleikar. Her er als ikki talan um nakra frítíð, tí aspirantarnir eru í gongd 12 mánaðir um árið. Á fundi við Reiðarafelagið fyri Farma- og Frálandaskip um hetta málið hevur Føroya Skipara- og Navigatørfelag gjørt vart við støðuna. Semja varð gjørd um, at aspirantarnir skulu fáa 100 krónur fyri hvønn mynstraðan dag fram til 31. desember 2016.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur sent inn viðmerkingar til Mentamálaráðið um hetta málið, og felagið væntar at verða boðið til fundar fyrsta dagin.





**Eik Banki P/F**, Tel. 348000
eik@eik.fo , www.eik.fo

Eik
Tað snýr seg um teg

# 36 fingu prógv

## 20. januar fingu 13 maskinmeistarar, 8 skipsførarar og 15 skiparar prógv síni handað á samkomu á Vinnuháskúlanum í Havn.

TEKSTUR: INGOLF S. OLSEN – PRESS. MYNDIR: ERLAND H. RASMUSSEN – VINNUHÁSKÚLIN

Sum altíð var Skálin á Vinnuháskúlanum stúgvandi fullur av makum, foreldrum, systkjum og øðrum avvarandi, tá prógvhandan var fríggjadagin 20. januar.

Skúlastjórin beyð vælkomin, og síðani varð sangurin „Føroyar, tá sólin" sungin, áðrenn Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, helt røðu sum gestarøðari.

Síðani vóru prógvini handað, og tilsamans 36 lesandi luku prógv í vetur – 13 maskinmeistarar, 8 skipsførarar og 15 skiparar.

Eftir prógvhandanina var orðið frítt, har næmingaumboð fyri hvønn flokkin søgdu nøkur orð, og Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, helt eina stutta røðu.

Sum siður er endaði formliga hátíðarløtan við, at tjóðsangurin varð sungin, og síðani var hugni við einum drekkamunni og onkrum søtum afturvið.

Hesi fingu prógv:



**MASKINMEISTARAR:** Finn Danberg, Reindolf Hao Delasi Deku, Róin Erlendsson Simonsen, Jens Jón Andreassen, John Rúnason Nielsen, Niklas Pætur Weihe, Sigmundur Noslø, Mats Andrias Poulsen, Regin Slættanes, Herbjørn Lava, Jákup Sjúrðarson Ejdesgaard, John Høj Joensen og Rókur Johannesen.
**VIRÐISLØNIR:** 1. Rókur Johannesen, fartelefon frá Suðuroyar Sparikassa. 2. Finn Danberg, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum. 3. Mats Andrias Poulsen, grindaknív frá SEV.
**ÍDNISVIRÐISLØN:** Finn Danberg, gullur frá A. P. Møller.

Framhald á næstu síðu >

**SKIPSFØRARAR:** Martin Mohr í Grund, Gunleif Lyngvej Poulsen, Marner Johannes D. Ludvig, Jón Heðin Jørgensen, Jón Poulsen, Eyðun Jespersen, Bergleif Brimvík og Ásmundur Poulsen.
**VIRÐISLØNIR:** 1. Gunleif Lyngvej Poulsen, gullur frá A. P. Møller. 2. Martin Mohr í Grund, barometur og klokku frá Tryggingarfelagnum Føroyar. 3. Jón Poulsen, barometur og klokku frá Antares.
**ÍDNISVIRÐISLØN:** Bergleif Brimvík, ur frá Søfartens Ledere.





**SKIPARAR:** Beinir Brattaberg Evaldsson, Jóannes Kári Hansen, Petur Brian Nolsøe, Fríði av Vollanum, Ingvar Virgarsson Hentze, Hans Jákup Davidsen, Stefan Gunnbjørnsson Joensen, Øssur Johnsson Johannesen, Bjartur Olsen, Jens Thomsen, Jógvan Dam, Mads Andrias Hentze, Rókur Eyvindsson, Pætur Pólsson Johansen og Trygvi Jacobsen. Pætur Polsson Joahansen, Ingvar Virgarsson Hentze og Mads Andrias Hentze vanta á myndini.
**VIRÐISLØNIR:** 1. Rókur Eyvindsson, kikara frá p/f Thor. 2. Bjartur Olsen, barometur og klokku frá Faroe Ship. 3. Stefan Gunnbjørnsson Joensen, barometur og klokku frá Faroe Agency.
**ÍDNISVIRÐISLØN:** Øssur Johnson Johannesen, ur frá Søfartens Ledere.



Wilhelm Petersen, skúlastjóri, bjóðaði vælkomin og stýrdi hátíðarhaldinum.

Sum siður er, var eisini ein virðisløn latin næminginum við hægsta próvtali millum skipararar og skipsførarar. Hesa virðislønina, sum var ein sekstantur frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, fekk Rókur Eyvindsson.



Skálin var sum altíð stúgvandi fullur av fólki til hátíðarligu løtuna.



Finn Danberg segði nøkur orð vegna nýklaktu maskinmeistararnar.



Martin Mohr í Grund, nýútbúgvin skipsførari, segði nøkur orð.

Framhald á næstu síðu >

# Tað er neyðugt at sigla

**Næstan frá fyrsta degi í siglingarsøgu Føroya sóu menn týdningin av útbúgving innan sigling, staðfesti Annfinnur Garðalíð í síni røðu. Hann tók samanum søguna, síðani fyrsta sluppin kom til landið, og endaði við einari inniligari áheitan til nýklaktu yvirmenninar um at hugsa um trygdina.**

TEKSTUR: INGOLF S. OLSEN – PRESS. MYNDIR: ERLAND H. RASMUSSEN – VINNUHÁSKÚLIN

Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, byrjaði sína røðu við at endurgeva kendu orðini hjá rómverska generalinum Pompejus, „navigare necesse est vivere non est necesse" – „tað er neyðugt at sigla, ikki at liva".

Generalurin mælti orðini, tá hann gav harraboð um at sigla eina lívsneyðuga last av korni úr Afrika tvørtur um Miðjarðarhavið til Rom, sjálvt um óveður herjaði.

– Tey, sum kenna okkara siglingarsøga vita, at føroyingar mangan hava staðið í slíkari støðu. Hóast hetta, so verða ongi óráð tikin, segði Annfinnur Garðalíð.

Við samanberingini vísti hann á, hvussu neyðugt tað hevur verið hjá føroyingum at søkja havið við siglingarkønum fólki á odda, líka síðani føroyska siglingarsøgan av álvara byrjaði í 1872. Tá keyptu trappubrøðurnir í Havn fyrstu føroysku sluppina, Fox.

## Tær fyrstu vanlukkurnar

Tey fyrstu árini lærdu menn seg at navigera í Danmark ella Onglandi, men fiskiskapurin vant upp á seg, og skipatalið øktist skjótt tey fyrstu tíggju árini. Í 1882 vóru 22 fiskiskip í flotanum. Men so steðgaði framgongdin, serliga tí stórar vanlukkur raktu. Í 1880-árunum gingu tríggjar føroyskar sluppir burtur við mann og mús – tvær á Vesturlandinum og ein á Suðurlandinum í Íslandi.

Skipatalið minkaði, og í 1891 var tað komið niður á 14 sluppir.

– Helst hava hesar hendingar verið so mikið álvarsamar í lítla føroyska samfelagnum, at fleiri hava hugsað at tørvur var á at fáa eina betur frálæru ella eina veruliga útbúgving, sum kundi gera mun og byrgja fyri teimum ringastu vanlukkunum. Tað er í hvussu er soleiðis vit hugsa í dag, tí hava vit eisini krevjandi útbúgvingar á Vinnuháskúlanum, har trygdin er í miðdeplinum.

– Við teirri vitan vit hava í dag ivast vit ikki í, at skipað útbúgving eisini hevur verið neyðug, tá føroyska fiskivinnutjóðin tók síni fyrstu fet, segði Annfinnur Garðalíð.

Tað var eisini tað, sum hendi, tí í 1893 verða tveir skiparaskúlar settir á stovn í Havn.

Og í 1895 varð Føroya Skipara- og Navigatørfelag stovnað sum hitt fyrsta føroyska yrkisfelagið.

Annfinnur Garðalíð greiddi frá, hvussu felagið gjøgnum tíðirnar hevði verið við í oddanum at fáa føroyingum fiskirættindi á fjarleiðum.

## Forðingar í Grønlandi

Annfinnur Garðalíð greiddi soleiðis frá:

Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, tók saman um føroysku siglingarsøguna og leiklutin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Hann legði stóran dent á, at trygdin altíð eigur at verða sett fremst umborð.



„Á einum aðalfundi í Føroya Skipara- og Navigatørfelag varð skotið upp, at heita á Løgtingið um at stuðla fiskivinnuni soleiðis, at føroysk skip fingu loyvi at fara til fiskiskap undir Grønlandi.

Ein kendur norskur skipari, sum førdi ein hvalastingara, hevði boðað frá, at hann hevði sæð nógvan fisk í Grønlandi. Hesi tíðindi høvdu við sær, at ein norsk skonnart summarið 1924 varð gjørd út til at fiska tosk og kalva undir Grønlandi.

ANNFINNUR GARÐALÍÐ:

**Hugsið um trygdina – tað at sigla trygt, at koma trygt heim aftur til síni kæru, um tað so er frá fiskarí ella aðrari sjóvinnu. Vit eiga altíð at hugsað um trygdina á sjónum.**

Skipið var úr Ålesund, og 13. mai 1924 vóru teir á Havnini eftir fuglfirðinginum Edvard í Lánni, sum fór við sum stýrimaður. Ein annar føroyingur, nevndur Gøtujákup, fór við sum flekjari.

Føroyingar vóru ógvuliga spentir uppá, hvussu henda royndin fór at gangast.

Tá teir høvdu roynt eina viku, rendu teir seg í fisk, og væl lá fyri. Á einum línustykkið, sum hevði 660 húkar, fingu teir tosk á 300 húkum og kalva á hinum.

21. juni 1924 góvust teir at fiska kalva og royndu nú bara eftir toski. Skiparin greiddi frá, at har var ørgrynna av stórum toski. Á einum línustampi við 90 húkum høvdu teir fingið 70 stórar toskar og 20 kalvar.

Longu 13. juli góvust teir at fiska. Tá høvdu teir fingið 80 tons av stórum toski og 200 tunnur av kalva.

Teir vóru nú til reiðar at sigla heim, men fóru fyrst inn undir land at umvæla skipið og hála vatn. Ein lutur í motorinum var í ólagi, ein skaða høvdu teir undir hekkuni, og vatnið var farið at ganga undan.

Teir fóru inn á eitt pláss, sum ikki stóð í loyvinum, og tá teir nakrar dagar seinni komu út aftur og skuldu seta kós til havs, steðgaði ein motorbátur teimum. Umborð vóru ein loytnantur og seks aðrir menn, vápnaðir við sáplum og løddari byrsu.

Teir góvu skiparanum boð um at sigla inn aftur hagar, teir vóru komnir frá, og bíðað varð so eftir einum verjuskipi, sum skuldu taka støðu í málinum. Niðurstøðan var greið, at teir høvdu forbrotið seg, at tí skuldi norska skipið sleipast til Godthåb.

Har var vápnað vakt sett umborð, og manningin var avhoyrd. Skiparin varð hóttur við, at hann skuldi gjalda 25.000 krónur í bót. Hetta noktaði norski skiparin, og 17 dagar seinni, 2. august 1924, fingu teir boð um at fara, hóast teir hvørki høvdu fingið ávaring ella bót.

ANNFINNUR GARÐALÍÐ:

**Við teirri vitan vit hava í dag ivast vit ikki í, at skipað útbúgving eisini hevur verið neyðug, tá føroyska fiskivinnutjóðin tók síni fyrstu fet.**

Sum áður nevnt vóru menn í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sum dugdu at síggja, at

Framhald á næstu síðu >

fiskileiðirnar undir Føroyum og Íslandi, ikki vóru í samsvar við tann tørv, sum føroyingar høvdu.

Tí heitti Føroya Skipara- og Navigatørfelag á løgtingið um at virka fyri, at føroyingar kundu fáa veiðirættindi í eystur- og Vesturgrønlandi.

Úrslitið gjørdist, at danir á sumri 1925, loyvdu føroyskum skipum at fara til fiskiskap undir Grønlandi. Men hetta var ikki treytaleyst. Ein røð av avmarkingum fylgdi við loyvinum. Og tað er ongin loyna, at mangir skiparar mettu, at treytirnar vóru settar, tí danir vildu forða fyri, at føroyingar fóru undir at reka fiskiskap undir Grønlandi. Men føroyingar royndu kortini, og teir fingu tað at bera til, tí hjá okkum er neyðugt at sigla."

### Trygdin fyrst

Annfinnur Garðalíð endaði sína røðu við einari inniligari áheitan á nýklaktu yvirmenningar, um altíð at hugsa um trygdina.

– Hugsið um trygdina – tað at sigla trygt, at koma trygt heim aftur til síni kæru, um tað so er frá fiskarí ella aðrari sjóvinnu. Vit eiga altíð at hugsað um trygdina á sjónum. Ikki minst nú vit hava verið rakt av vanlukkum við at missa fólk, og við at missa skip í eldsbruna.

– Til tykkum sum nú skulu út á sjógvin, er tað ynski okkara, at tit altíð hava hesi viðurskifti í huga, og gera tær venjingar, sum eru neyðugar. Føroya Skipara- og Navigatørfelag ynskir tykkum hjartaliga tillukku við prógvunum, og guðs ríku signing og blíðan byr, endaði formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag sína røðu.

# Onki arbeiðsloysi millum maskinmeistarar

**Maritima bransjan sum heild er í kreppu í okkara parti av heiminum, men millum maskinmeistarar er onki arbeiðsloysi. Teir sum missa kjansin á sjónum, fáa uttan trupulleikar starv á landi, staðfesti Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum á samkomuni á Vinnuháskúlanum.**

TEKSTUR: INGOLF S. OLSEN – PRESS. MYNDIR: ERLAND H. RASMUSSEN – VINNUHÁSKÚLIN

Í Noregi og hinum oljuframleiðandi londunum í okkara parti av heiminum verða frálandaskip løgd at kalla hvønn dag, og nógv sjófólk hava mist arbeiðið hesi seinastu árini við fallandi oljuprísum.

Men tað merkir ikki, at maskinmeistarar ganga arbeiðsleysir. Tað staðfesti Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, tá hann tók orðið á prógvhandanarsamkomuni á Vinnuháskúlanum.

– Tykkara arbeiðsøki er í einari støðugari menning og veksur skjót í breidd bæði á sjógvi og landi, og við tí heilt einastandandi fleksibilitetinum, maskinmeistarar hava, sær man teir allastaðni, har brúk er fyri

– Í framtíðini fara skipini at sigla mannleys – ella næstan, tí helst verður altíð brúk fyri meistarum, og teir verða í øllum førum teir síðstu, sum fara í land, segði Páll Hansen.



dugnaligum fólk. Tað er tað høga førleikastøðið, ið tit hava, sum ger tykkum væl kvalifiseraðar at taka avgerðir á tekniska økinum og samstundis gevur tykkum eina sterka persónliga gjøgnumbrotsmegi, segði hann beinleiðis við nýklaktu maskinmeistararnar.

## Bjartskygni

– Tað liggja 190 skip í Noregi, norsk skip liggja eisini í Skotlandi, og offshore skip liggja eisini í øðrum havnum í norðurlondum. Men tað liggja fleiri skip, enn tað eru arbeiðsleysir maskinmeistarar í Noregi – hesin veruleikin sigur okkum eitt sindur um fleksibilitetin hjá maskinmeistarum. Tað er so at siga onki arbeiðsloysi millum maskinmeistarar í Skandinavia og hinum Norðurlondunum, segði Páll Hansen.

Páll Hansen vísti á, at hóast keðiligu støðuna hjá norsku frálandavinnuni, so eru bert umleið 240 maskinmeistarar skrásettir sum arbeiðsleysir í norska maskinmeistarafelagnum.

Og hann kundi siga frá bjartskygni í bransjuni í Danmark. Har ganga í løtuni umleið 3000 næmingar á maskinmeistaraskúlunum kring landið, og talan er um at økja upptøkutalið.

– Orsøkin er serliga hon, at danski útflutningsídnaðurin manglar kvalifiserað fólk, harímillum maskinmeistarar til leiðslu og sum millumleiðarar, segði formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

## Meistarin síðstur í land

Maskinmeistarafelagið tekur aktivt lut í norðurlendska samstarvinum millum maskinmeistarafeløg, NMF (Nordiska Maskinbefälsfederationen), sum tilsamans telur meira enn 30.000 maskinmeistarar. Í felagsskapinum vænta tey, at tíðin, tá skipini fara at sigla mannleys – ella næstan – ikki er so langt burturi.

– Vit hoyra ofta tos um hesi sonevndu dronuskipini, og í NMF hava vit fingið tvey umboð við í teir arbeiðsbólkar, sum IMO (International Maritime Organization) hevur sett at viðgera hetta evni. Ætlanin er at brúka ein norskan og ein asiatiskan fjørð til royndir við dronuskipum, og vit rokna við, at hettar einaferð í framtíðini gerst veruleiki.

– Men takið tað bara róligt, tí eg tori at siga, at maskinmeistarin verður tann seinasti persónurin, sum fer í land, segði Páll Hansen.

# Vápnaðar vaktir forða sjóránum

**Hóast tað í 2016 vóru fæst sjórænaraálop í 20 ár, so merkir tað ikki, at vit ikki kunnu vænta fleiri sjórænaraálop, ávarar Richard Scurell, sum er serfrøðingur í sjórænaramálum. Sjóránini kunnu eisini vaksa aftur í Somalia.**

GREININA HEVUR **PIA ELERS** SKRIVAÐ TIL „SØFARTENS LEDERE" NR. 6/2016. UMSETT: **ØSSUR WINTHEREIG** – PRESS



Ein deyður sjórænari. Tað hoyrir man ikki so ofta um. Men tá ein tangaskip herfyri var álopið 61 fjóðringar úr Nigeria, skeyt manningin fyri at reka álopsmennirnar burtur. Tað eydnaðist at sleppa undan álopinum. Og ein av sjórænarunum var skotin til deyðis. Álopið á tangaskipið hendir í somu viku, sum eitt bingjuskip frá Maersk var álopið í Guineavíkini. Hetta vísir, at í Vesturafrika er vaksandi vandi fyri sjóránum. Tryggingarfeløgini hava hækkað prísirnar fyri skip, sum sigla har.

„Okkara royndir í Somalia og Adenvíkini eru, at vápnaðar vaktir umborð er besta verjan móti álopum frá sjórænarum," sigur Richard Scurrell, deildarleiðari í bretska trygdarfelagnum SCR.



„Hetta er ein sera trupul støða. Tí um skipini yvirhøvur skulu vera tryggjað, tá tey sigla í Guineavíkini, krevja tryggingarfeløgini vanliga, at vápnaðar vaktir eru umborð. Men tað kunnu reiðaríini ikki eftirlíka, tí lógin í Nigeria bannar, at privat útlendsk vaktarlið eru umborð í nigerskum sjógvi" greiðir Richard Scurrell frá. Hann er deildarleiðari í trygdarfelagnum SCR, Special Contingency Risks Ltd. Bretska felagið hevur serfrøði at meta um vandarnar fyri sjóráni og hevur fleiri stórar altjóða fyritøkur sum kundar. Felagið ráðgevur eisini, hvussu reiðarí og aðrar fyritøkur kunnu minka um vandan fyri álopum og í ringasta føri, at manning ella medarbeiðarar verða rænd.

## Herd álop

SCR og onnur feløg innan trygdararbeiði fylgja eisini gjølla við í Suðureysturasia – serliga í sjónum kring Filipsoyggjarnar, Indonesia og Maleisia. Higartil hava flestu álop verið at kalla vandaleys, har talan ofta var um stuldur av endum og trossum og øðrum umborð – og stuldur ímóti manningunum. Men nú eru álopini – serliga í sjónum millum Borneo og syðra part av Indonesia vorðin munandi meira harðrend.

„Vit hava sæð fleiri álop, og tey eru harðrendari, enn tey vóru áður. Fiskiskip og summi stuttleikaskip er álopin, og manningin rænd. Hetta er sera álvarsamt, tí áleypararnir ofta eru ymiskir islamistiskir bólkar, sum siga seg halda við ISIS", sigur Richard Scurell, sum eisini hevur verið við í samráðingum við gíslarænarar.

„Tað er sera trupult at samráðast, tá talan er um yvirgangsbólkar. Teir krevja ofta heilt høpisleysar upphæddir fyri at lata gíslar leysar – familjurnar hava ongan møguleika at gjalda. Og onkuntíð er endamálið meiri politiskt enn fíggjarligt, og tá er ofta vandi fyri, at gíslarnir kunnu verða dripnir," sigur bretski trygdarserfrøðingurin.

Hann vísir tó á, at higartil eru størri fraktskip ikki álopin og tað eru heldur ikki frágreiðingar um álop á teimum stóru altjóða siglileiðunum. Men kortini heldur hann ikki, at eitt nú Maersk kann kenna seg heilt trygt við sínum stóru og skjóttgangandi bingjuskipum.

„Undir øllum umstøðum er tað at vísa rættstundis nærlagni at halda skert útkikk og hava vatnkanónirnar klárar. Og tá flestu skip, sum sigla í Indiska Havinum hava píkatráð umborð og trygdarrúm at forskansa seg í, so ræður um at hava alla útgerðina klára," sigur Richard Scurell.

22. november gavst Danmark í Nato-átakinum at verja skip í Adenvíkini. Umleið 100 mans hava tikið lut í „Ocean Shield".

Útlendsk privat vaktarlið eru ikki loyvd í nigerskum sjógvi.





## Fæst álop í 20 ár

Annars fegnast tey í handilsflotanum um, at 2016 var eitt ár við sera fáum sjóránum. Fyrstu níggju mánaðirnar í fjør vóru 141 álop – tað lægsta í 20 ár. Tey flestu – 26% av øllum álopum og gíslatøkum – hendu í Vesturafrika í Guineavíkini uttan fyri Nigeria og Kamerun.

„Okkara royndir í Somalia og Adenvíkina vísa jú, at besti mátin at halda sjórænarar burtur, er at hava vápnaðar vaktir við umborð. Tá tað ikki ber til uttan fyri Nigeria, so eru tangaskipini í størri vanda. Serliga tá skipini liggja og bíða eftir tørni at sleppa í havn," sigur Richard Scurell.

„Reiðaríini kunnu keypa sær vaktir frá lokalum nigerskum trygdarfyritøkum, men tað er ikki besta loysnin. Tí hvørja venjing hava teir fingið til at verja eitt skip, sum verður álopið av teirra egnu landsmonnum? Har eru ov nógvar óvissur knýttar at."



## Vandi á ferð við Hornið

Meðan fleiri álop henda í suðurasiatiskum og vesturafrikanskum sjógvi, so er einki álvarsligt álop hent við Hornið á Afrika síðani 2012. Tryggingarfeløgini hava eisini lækkað gjaldið fyri skip, sum sigla har. Í fjør tók Danmark eisini sítt seinasta eftiransingarflogfar heimaftur. Í níggju ár var Danmark við í Nato-átakinum „Odean Shield".

„Hóast tað sær út sum, álopini við Hornið í Afrika og í Adenvíkini eru hildin uppat, so skulu vit neyvan vænta, at so er. Tey kunnu brádliga taka seg uppaftur. Fyritreyirnar eru har, tí bæði búskaparligu og politisku viðurskiftini í Somalia eru sera ótrygg. So um eg var reiðari, hevði eg verið varin," sigur Richard Scurell.

# BROT ÚR DAGBÓK

**20-10-2016**
Nevndarfundur í FSN.

**24-10-2016**
Samráðingarfundur umborð á Smyrli.

**15-11-2016**
Rættarfundur, Anita.

**17-11-2016**
Fundur við manning frá Skansi Offshore.

**18-11-2016**
Jólaborðhald á FSN – starvsfólk á skrivstovuni.

**23-11-2016**
Fundur við manning umborð á SSL-skipum í Norðoyggjum.

**24-11-2016**
Fundur á kontórinum um sáttmála-samráðingar.

**25-11-2016**
Fundur við Numo.

**25-11-2016**
Rættarfundur / dómur Anita.

**29-11-2016**
Fundur við Runarvíkar Havn.

**30-11-2016**
Fundur við Grannskoðaran Numo.

**02-12-2016**
Nevndarfundur í FSN.

**05-12-2016**
Fundur millum FSN og Realin.

**05-12-2016**
Fundur millum FSN og manning í Frálandavinnuni.

**06-12-2016**
Mið og Magn-fundur í FSN.

**09-12-2016**
Fundur millum manningarfeløgini og FR, samanskriving av sáttmála.

**15-12-2016**
Nevndarfundur í FSN.

**16-12-2016**
Fundur í Fiskivinnuráðnum.

**20-12-2016**
Kunningarfundur umborð á Smyrli og Ternuni viðvíkjandi sáttmálasam-ráðingum.

**21-12-2016**
Fundur millum FSN og Føroya Kærustovn.

**28-12-2016**
Ársaðalfundur í FSN.

**28-12-2016**
Nevndarfundur í FSN nevndin skipar seg.

**03-01-2017**
Sýnsfundur millum FSN og trygg-ingina.

**04-01-2017**
Fundur millum FSN – FF og JFK.

**05-01-2017**
Fundur millum Reiðaríðið Thor og manningafeløgini.

**06-01-2017**
Mið og Magn Blaðfundur.

**09-01-2017**
Fundur í fiskimálaráðnum. Fram-løga hjá Høgna Hoydal um fiski-vinnunýskipan.

**10-01-2017**
Kunningarfundur umborð á Teist-anum.

**11-01-2017**
Fyrireikandi fundur um samráðingar við SSL.

**11-01-2017**
Handan av sáttmálakrøvum FSN og FML SSL.

**12-01-2017**
Sjóforhoyr Vesturland.

**17-01-2017**
Nevndarfundur í FSN.

## Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum

Páll Hansen, formaður

**04-10-2016 ALS-Húsið**
Trygdargrunnur fiskivinnurnar – stýrisfundur. Kunnað bleiv um gongdina higartil í ár, og staðfest varð, at úrslitið er nøktandi. Fíggjarætlanin fyri 2017 varð løgd fram, eisini varð tosað um áseting av minstuløn og minstaforvinningi.

**05-10-2016 MF**
Fyrsti fundur við lønardeildina um nýggjan sáttmála fyri maskinmeistarar við skipunum hjá SSL.

**06-10-2016 FSN**
Blaðfundur. Síðsti fundur áðrenn deadline til komandi blað. Flestu greinar um at vera lidnar.

**17-10-2016 MF**
Annar fundur við lønardeildina. Á hesum fundi handaðu partarnir hvørjum øðrum krøvini, hesi vórðu síðan stutt gjøgnumgingin og nýggjur fundur avtalaður.

**24/25-10-2016 NMF fundur í Reykjavík**
Hálvárligur fundur í norðurlendska meginfelagnum fyri maskinmeistarafeløg, NMF, var í Reykjavík hesar dagar. Hesaferð varð eisini talan um kongress soleiðis, at nýggjur forseti skuldi veljast. Páll Hansen legði tískil frá sær sum forseti í NMF, og síðani varð Guðmundur Ragnarsson valdur til forseta komandi 3 árini.

**27-10-2016 Keypmannahavn**
Fundur við umboð fyri Polar Seafood um sáttmálaviðurskifti hjá maskinmeistaranum við Polar Nanoq.

**28-10-2016 MF**
Nevndarfundur. Kunnað varð um NMF-fundin í Reykjavík og fundin við Polar Seafood í Keypmannahavn. Tosað varð eisini um samráðingarnar við SSL og um fiskivinnupolitikk.

**02-11-2016 FSN**
Blaðfundur Mið og Magn. Avtala er er gjørd við Estra um prentan av blaðnum framyvir.

**10-11-2016 Smæran**
Temadagur um nýggja lønarskipan innan tað almenna. Endamálið við degnum var at seta eina lønarnevnd at arbeiða við framtíðar lønarskipanum.

**15-11-2016 Brúgvin**
Fundur á Vinnuháskúlanum, Maritima Útbúgvingarráðið. Mál til ummælis v.m.ø. maskinmeistaraaspirantum á Vinnuháskúlanum og B.Sc. útbúgving í samstarvi við Fróðskaparsetrið.

**17-11-2016 MF**
Fjórði samráðingarfundur við FMR um SSL.

**25-11-2016 MF**
Nevndarfundur. Tosað varð um støðuna í samráðingunum við SSL. Semja var um at siga sáttmálan upp við Reiðarafelagið fyri farmaskip – bæði stór og smá. Tað sokallaða „Blue Card“ var eisini uppi og vendi.

**02-12-2016 Farstøðin**
Fimti samráðingarfundur um SSL. Sum avtalað frammanundan varð eitt semjuuppskot lagt fram. Semja fanst ikki um hýruna. Snorri segði, at hann sum eina allarsíðstu roynd fer at spyrja Kristinu Háfoss.

**06-12-2016 FSN**
Blaðfundur. Eftirmeting av síðsta blaðið, og greinar til komandi blað. FSN boðaði frá á hesum fundi, at teir í framtíðini fara yvir til elektroniska útgávu av blaðnum.

**08-12-2016 Farstøðin**
Samráðingarfundur um SSL. Partarnir ásannaðu, at ikki fanst semja um hýruna, og semja var um at boðsenda semingsmanninum. Lønardeildin átók sær hetta. Avtalaðu eisini at halda frí um jólini og byrja seming í viku 1 í 2017.

**09-12-2016 Kaffihúsið**
Kunnandi fundur um handfaring av strongd. Tað var Psykologdepilin, sum kunnaði um eitt konsept, sum er ment í samstarvi við „Center for Moderne Arbeidsliv i Danmark“, og sum tey hava góðar royndir við.

**13-12-2016 Smæran**
Flestu fakfeløgini vóru møtt til hendan fundin um lønarnevnd. Semja var um at skipa eina lønarnevnd við 7 fólkum. Ein felagsbólkur verður settur at fylgja við arbeiðinum. Fakfelagssamstarvið samskipar arbeiðið at finna 3 umboð fyri fakfeløgini til nevndina.

**21-12-2016 FF**
Avtala gjørd millum manningarfeløgini og P/F Varðin, P/F Framherji og P/F Faroe Origin um fiskiskap í ES-sjógvi og norskum sjógvi fyri 2017.

**05-01-2017 FSN**
Fundur millum FSN, MF og FF um sáttmálaviðurskifti hjá skipinum „Hoyvík“ nú tað kemur til landið. Semja var um at lýsa mynstringarbann móti skipinum um onki hoyrdist frá Thor í seinasta lagi á middegi tann 06-12-2016.

**06-01-2017 Mynstringarbann**
Klokkan 17.00 byrjaði fundur við umboð fyri reiðaríið og manningarfeløgini í hølunum hjá FF, og longu Kl 19.00 varð avtala undirskrivað og mynstringarbannið avlýst .

**09-01-2017 Fiskimálaráðið**
Manningarfeløg og arbeiðarafeløg vóru á fundi við Høgna Hoydal, har hann greiddi frá støðuni í málinum um fiskivinnunýskipanina

**10-01-2017 MF**
Fyrireikandi fundur millum Semingsstovnin og Maskinmeistarafelagið, har vit greiddu teimum frá støðuni millum Lønardeildina og okkum.

**11-01-2017 Fuglafjørður**
Fundur á skrivstovuni hjá Framherja. Á fundinum vóru umboð fyri MF, JFK og formaðurinin fyri Føroya Reiðarafelag. MF vísti á, at tað verða gjørdar avtalur uttan um Føroya reiðarafelag og Maskinmeistarafelagið um dagviðbót. Hettar er sera óheppið.

**12-13/ 01-2017 Hotel Føroyar**
Fundur millum Semingsstovnin, MF og lønardeildina um sáttmálaviðurskifti á skipunum hjá SSL. Semingin endaði við eini semju seinnapartin fríggjadagin tann 13. januar og tíðindaskriv varð sent út.



# Óli Hans Olsen

BRENNI-DEPILIN

**Føddur:** 23-04-1971

**Parlagsstøða:** Giftur við Gudrun Kjærbo Olsen. Tey eiga sonin, Óla Jákup

**Útbúgving:** Skipsførari í 1995

**Starv:** Skipari á Brimli

**Hvussu heldur tú útlitini vera hjá skipsførarum í dag?**
Tey hava kanska onkuntíð verið betri, men um áræði er til staðar, so er nokk ongin trupulleiki at fáa tjans og arbeiða seg uppeftir.

**Hvør er størsta avbjóðingin hjá einum skipsførara?**
Hann skal megna at fylgja við øllum broytingum, bæði myndu-leikakrøvum og tøknuligum broytingum. Tíverri er tað ikki soleiðis longur, at ein navigatørur verður vektaður eftir, hvat hann dugir av sjómanskapi, men meira eftir hvat teldukunnleikin er.

**Nær vart tú fyrstu ferð til skips – og við hvørjum?**
Í 1987 við partrolaranum Vest-menningi. Skipið eitur í dag Vesturtúgva.

**Hvat hevur verið longsti túrur tín til skips og við hvørjum?**
Var einaferð útmynstraður í sjey mánaðir við danska skipinum Prince of Scandinavia hjá DFDS.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
Eigi nakað av jørð, so nógv av fríðtíðini fer at fáast við seyð.

**Hvat slag av bili hevur tú?**
Kia Ceed

**Hvørja teldu hevur tú?**
HP

**Hvør er besta bókin, tú hevur lisið?**
Profeterne i evighedsdalen, sum Kim Leine hevur skrivað.

**Hvønn tónleik/sang dámar tær best?**
Mær dámar best contry tónleik og føroyskan tónleik.

**Hvør er besti filmur, tú hevur sæð?**
Havi ikki nakran beinleiðis yndis-film, men ein góður krimi er ikki so galin.

**Hvat kann gleða teg í gerandis-degnum?**
Tá familjan hevur tað gott, og tá tað gongur væl í arbeiðinum.

**Hvat kann øsa teg í gerandis-degnum?**
Tá fólk grenja um smáting, og tá fólk øvunda øðrum, tí tað gongur væl.

# FØÐINGARDAGAR

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ:

| | | |
|---|---|---|
| Linjohn Kjærbech, Vágur | 21/3-1947 | 70 ár |
| Eliesar Finnsson, Porkeri | 5/2-1957 | 60 ár |
| Torkil Sørensen, Tórshavn | 20/3-1957 | 60 ár |
| Johannes P. Mikkelsen, Syðrugøta | 23/3-1957 | 60 ár |
| Jónfinn Egilsnes, Vestmanna | 21/1-1967 | 50 ár |
| Virgar Zachariasen, Sandur | 3/1-1977 | 40 ár |
| Hans Petur Olsen, Hoyvík | 15/1-1977 | 40 ár |
| Jandus Jacobsen, Kollafjørður | 31/1-1977 | 40 ár |
| Ólavur Zachariassen, Eiði | 2/3-1977 | 40 ár |
| Sámal Johan Høgnesen, Klaksvík | 17/3-1977 | 40 ár |
| Sune Dam Fredriksen, Miðvágur | 21/3-1977 | 40 ár |
| Andrass Hammersheimb Poulsen, Tórshavn | 27/2-1987 | 30 ár |

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ:

| | | |
|---|---|---|
| Asbjørn Matras, Sandur | 28/3-1947 | 70 ár |
| Heri Dam, Tórshavn | 6/2-1957 | 60 ár |
| Hanus Christiansen, Eiði | 14/2-1957 | 60 ár |
| Tryggvi Fríðrikkur Johansen, Hoyvík | 15/2-1957 | 60 ár |
| Ingolf Weihe, Selatrað | 16/2-1957 | 60 ár |
| Jógvan Joensen, Norðskáli | 15/1-1967 | 50 ár |
| Aksel Larsen, Tórshavn | 15/2-1967 | 50 ár |
| Oddur Nielsen, Trongisvágur | 19/2-1967 | 50 ár |
| Pauli Jacobsen, Sørvágur | 23/2-1967 | 50 ár |
| Poul Johan Danielsen, Toftir | 2/3-1967 | 50 ár |
| Pauli Olsen, Tórshavn | 12/3-1967 | 50 ár |
| Janus Bergur Olsen, Sandur | 21/3-1967 | 50 ár |
| Petur E. Debes, Miðvágur | 2/1-1977 | 40 ár |
| Fríði Danberg, Streymnes | 7/1-1977 | 40 ár |
| Óli við Ravnagil, Klaksvík | 20/1-1977 | 40 ár |
| Anfinn Jacobsen, Klaksvík | 25/1-1977 | 40 ár |
| Jóhannes Sivertsen, Norðdepli | 29/3-1977 | 40 ár |
| Joan Petur Joensen, Eiði | 25/1-1987 | 30 ár |
| Marner Ludvig, Vágur | 5/2-1987 | 30 ár |
| Hans Asbjørn Eysturdal, Skáli | 20/2-1987 | 30 ár |
| Rókur Henryson, Tvøroyri | 23/2-1987 | 30 ár |
| Egil Bjarnason Heinesen, Vestmanna | 27/3-1987 | 30 ár |

PENSJÓN

trygging.fo



Vit føra tína pensjón

# trygt í havn

**Sum limur í Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur tú møguleika frítt at velja, hvar tú ynskir at hava tína pensjóns-samansparing og lívstrygging.**

**Endamálið er at tryggja eina munagóða samansparing**, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**



**Hevur tú spurningar,** ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, so set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR